LM-055/2022

LØGTINGIÐ

Mentanarnevndin

Løgtingsformaðurin

14. apríl 2023
hm/ód

Leingjan av freist til framløgu av áliti í teimum málum, sum eru í Mentanarnevndini

Í málinum um bókasavnslóg hevði nevndin tveir fundir við hoyringum fyri páskir. Av serligum orsøkum hevur nevndin ikki havt nakran fund síðani. Nevndin væntar at verða komin á mál við hoyringum í øllum málunum í endanum av viku 17.

Nevndarformaðurin fer tí at heita á løgtingsformannin um at leingja freistina sbrt. § 32, stk. 2 í Tingskipanini viðvíkjandi teimum málum, sum eru í Mentanarnevndini, til mánadagin 8. mai 2023.

Málini, ið talan er um, eru hesi:

Løgtingsmál nr. 55/2022: Uppskot til løgtingslóg um bókasøvn (Bókasavnslógin)
Málið var til 1. viðgerð 16. mars 2023.

Løgtingsmál nr. 74/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt (Pengarnir fylgja barninum)
Málið var til 1. viðgerð 16. mars 2023.

Løgtingsmál nr. 83/2022: Uppskot til samtyktar um at verja børnini ímóti porno og øðrum ágangi á internetinum
Málið var til 1. viðgerð 16. mars 2023.

Løgtingsmál nr. 87/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkakirkjuna í Føroyum (Heimild at býta upp embætisuppgávur millum próstar)
Málið var til 1. viðgerð 27. mars 2023.

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901

LOGTING.FO

LM-055/2022

Vegna nevndarformannin

Hallur Markná
nevndarskrivari